# Skrivstovunæmingur til Eiðis kommunu

Vit søkja eftir skrivstovunæmingi til umsitingina hjá Eiðis kommunu. Talan er um eina yrkisútbúgving innan almenna fyrisiting.

## Yrkisútbúgvingin

Útbúgvingin er fjøltáttað og fevnir um ein yrkisligan part og ein ástøðiligan part. Lærutíðin er vanliga tvey ár og skiftir ímillum starvsvenjing og skúlagongd. Longdin av lærutíðini er tengd at tíni útbúgvingarbakgrund. Skúlagongdin fevnir um fýra tíðarskeið í Danmark í 13-15 vikur, har tú kanst velja ímillum tríggjar ymsar skúlar.

## Tínar uppgávur

Í lærutíðini fært tú kunnleika til kommunala fyrisiting og ymiskar KT-skipanir. Uppgávurnar fevna millum annað um málsviðgerð, kundatænastu, samskipan, journalrøkt, bókhald, lønarviðurskifti, fyrisiting og samskifti. Vit leggja okkum eftir at seta teg væl inn í ymsu uppgávurnar og vegleiða teg, tá tørvur er á tí.

## Vælkomin til eitt mennandi læurupláss

Vit bjóða eitt mennandi lærupláss á einum væl skipaðum arbeiðsplássi við dugnaligum og fyrikomandi starvsfeløgum. Í lærutíðini verður tú partur av einum fakliga áhugaverdum og avbjóðandi umhvørvi, har vit leggja dent á góðan trivnað og gott samskifti millum starvsfelagar.

## Førleikar og eginleikar

Vit leita eftir umsøkjarum, sum:

- Hava staðið miðnámsútbúgving
- Eru væl fyri í føroyskum og enskum máli

- Vísa tev fyri KT og áhuga í talgilding
- Eru uppsøkjandi, jalig og álítandi
- Megna at arbeiða sjálvstøðugt og tola broytingar

## Setanarviðurskifti

Lønar- og setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelag. Talan er um eitt fulltíðar lærupláss, ið verður sett 1. apríl 2025 ella eftir avtalu.

## Umsókn

Send okkum eina umsókn við próvskjølum, viðmælum og royndum, í seinasta lagi 18. mars 2025.

## Vilt tú vita meira

Meira fæst at vita við at venda sær til Jógvan í Skorini, borgarstjóri á telefon 740400 ella til Guðrun Ejdesgaard, kommunuskrivari á telefon 740430 ella teldupost eidi@eidi.fo